

**NISSAN PATROL 2.8 TD** — 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** TN 397 **Km:** 147.000
**Árgangur:** 11.11.1998
**Útgjald:** 32.500 **Mðr. gjald:** 3.200 (3 ár)
**kr. 130.000,-**



**TOYOTA COROLLA 1.6 SEDAN** — 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** MN 261 **Km:** 12.000
**Árgangur:** 01.06.2007
**Útgjald:** 46.300 **Mðr. gjald:** 3.000 (5 ár)
**kr. 185.000,-**



**FORD FOCUS GHIA 1.6 BENSIN** — 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** VP 011 **Km:** 35.000
**Árgangur:** 30.12.2004
**Útgjald:** 37.000 **Mðr. gjald:** 2.425 (5 ár)
**kr. 148.000,-**



**COROLLA 1.4 LUNA B. D-4D** — 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** SF 673 **Km:** 88.209
**Árgangur:** 19.05.2005
**Útgjald:** 42.000 **Mðr. gjald:** 2.700 (5 ár)
**kr. 148.000,-**



**TOYOTA RAV 4 2.0 VVT-I 4X4** — 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** JG 132 **Km:** 55.000
**Árgangur:** 03.02.2005
**Útgjald:** 58.750 **Mðr. gjald:** 3.744 (5 ár)
**kr. 235.000,-**



**BMW 525I** — 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** LP 540 **Km:** 116.000
**Árgangur:** 14.08.2002
**Útgjald:** 53.750 **Mðr. gjald:** 5.300 (3 ár)
**kr. 215.000,-**



**AVENSIS 2.0 D-4D SOL DIESEL S/D** — 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** RV 811 **Km:** 113.500
**Árgangur:** 03.12.2003
**Útgjald:** 47.500 **Mðr. gjald:** 4.600 (3 ár)
**kr. 168.000,-**



**COROLLA 1.6 5D H/B AUT.** — 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** JH 264 **Km:** 117.878
**Árgangur:** 10.06.2002
**Útgjald:** 27.000 **Mðr. gjald:** 2.701 (3 ár)
**kr. 108.000,-**



**TOYOTA YARIS 1.4 D-4D DIESEL** — 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** KE 941 **Km:** 20.000
**Árgangur:** 11.05.2006
**Útgjald:** 34.500 **Mðr. gjald:** 2.250 (5 ár)
**kr. 138.000,-**



**SUBARU LEGACY 2.0 AUT.** — 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** AD 873 **Km:** 100.000
**Árgangur:** 09.03.2006
**Útgjald:** 49.500 **Mðr. gjald:** 3.172 (5 ár)
**kr. 178.000,-**

Lagalig fígging fæst til brúktu bilarnar

6 mánaða garanti

**Vit bjóða nú 6 mánaða garanti uppá bilar, ið kosta meira enn 85.000,-**
Garanti skipanin, ið hevur eina sjálvsábyrgd uppá kr. 500,-, fevnir um allar knappliga íkomnar feilir, i eygsæð ikki skyldast nýtslu brúkarans, rust, uttanífrákomnir skaðar ella væntandi tænastueftirlit.
Eingin gandur og eingir smáir bókstavir.
Kom og vitja okkum · landsins fremstu bilasølu.

Vegurin Langi • Hoyvík • Tel. 353040 • Fax 353041
rs@reyniservice.fo • www.reyniservice.fo

REYNI SERVICE P/F


# Kjartan Joensen á ting

Kjartan Joensen er aftur í Løgtinginum. Kjartan tekur sæti, nú Poul Michelsen er farin í farloyvið.

Kjartan Joensen tekur nú aftur sæti á Føroya Løgtingið. Kjartan Joensen er kendur í politikki, hann sat m.a alt tíðarskeið undir síðstu ABC samgongu frá 2004 til 2008.

Kjartan Joensen er búsitandi í Leirvík og starvast dagliga sum reiðari og stjóri á P/F Hvilvtenni. Kjartan Joensen skal røkja tingsessin hjá Poul Michelsen, sum farin í farloyvið.



*Kjartan Joensen*

# Opið tunnilsdagar í Runavík

**Handilsmiðdepilin í Runavík fer nú at leggja orku í at hava leingi opið tunnilsdagar**

HANDIL

Fyrsta leygardag í hvørjum mánaði í fleiri ár, hevur Handilsmiðdepilin havt opið til kl. 17.00. Handlarnir hava nú tikið avgerð um ikki at brúka hendan leygardagin, men ístaðin at leggja dent á tunnilsdagarnar. Tá verður opið til kl. 17.00, og handlarnir gera nógv burturúr søluni, so vitjandi fáa eina góða uppliving. Vónandi koma nógv fólk út á Skálafjørðin, tá ið tunnilsdagar eru.

Tunnilsdagarnar sum Handilsmiðdepilin í Runavík leggur dent á, eru teir sum hava tilknýtið til Norðoyartunnilin. Tunnilsdagarnir sum eftir eru í ár verða: 2. mai, 26. september, og 12. desember. Vanliga eru 4 tunnilsdagar í einum árið, tann fyrsti var 31. januar.

Handlarnir kunnu tó sjálvir gera ávís tiltøk og hava leingi opið, tá ið tað liggur fyri hjá teimum, eitt nú um handilin t.d. hevur føðingardag.

Tað er sera umráðandi fyri Handilsmiðdepilin at menna seg og verður tí stór orka løgd í at fylgja við tíðarrákinum, sigur Handilsdepilin í tíðindaskrivi.

# Aðalfundurin eftirlýsir sjúkrarøktarstjóra

FAKFELAG
*Tíðindaskriv*

Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar hevði leygardagin 14. mars 2009 ársaðalfund. Onki val var á skránni hesuferð, men sigast kann, at talan var um ein góðan og gevandi fund.

Eftir regluliga fundin varð drúgt orðaskifti um ymisk viðurskifti. Eitt evni sum serligur áhugi var fyri, var leiðsluviðurskiftini á Landssjúkrahúsinum. Starvið, sum sjúkrarrøktarstjóri, er enn ikki lýst leyst, hóast felagið fleiri ferðir hevur sent út áheitanir um, at fáa hetta starvið sett. Sum gongdin er í hesum máli, meta vit tað beinleiðis verða tekin um manglandi virðing fyri sjúkrarøktini og háðan av felagi og limum tess.

Sjúkrahússtjórin, sum er ein av stjórunum í 3 streingjaðu leiðsluni, bar fram fyri umleið 14 døgum síðani, at nú fór at verða lýst eftir sjúkrarrøktarstjóra, men enn er onki hent!

Felagið fer í vikuni at kallað øll álitisumboð fyri Landssjúkrahúsið til fundar, at umrøða hetta álvarsmál. Umrødd verða eisini onnur ógreið leiðaraviðurskifti á Landssjúkrahúsinum, sigur Vár í Gong, forkvinna í Felagnum Føroyskir Sjúkrarrøktarfrøðingar.



*Vár í Gong, forkvinna í Felagnum Føroyskir Sjúkrarrøktarfrøðingar*